***Ásetingar frá Mentamálaráðnum***

*Skúlin á Fløtum*

***Kunning um átøk í sambandi við kanningina um happing***

Við hesum verður kunnað um átøk, sum Mentamálaráðið hevur tikið stig til at seta í verk í sambandi við kanningina um happing millum næmingar í føroyska fólkaskúlanum. Átøkini eru ætlað sum hjálp og íblástur í arbeiðinum hjá skúlunum at skapa trivnað og fyribyrgja og viðgera happingarstøður.

**Evnisdagur 21. oktober 2015**

Skúlin á Fløtum hevur evnisdag ***21. oktober 2015***, har úrslitini í kanningini um happing verða umrødd og arbeitt verður við evninum trivnaður við atliti at sosiala felagsskapinum í flokkinum.

Mentamálaráðið hevur gjørt faldara, sum bæði er ætlað lærarum og næmingum at nýta í sambandi við evnisdagin. Við støði í faldaranum er ætlanin, at flokslærarin/toymi tosar við flokkin um kanningina og støðuna í teirra flokki.

Faldarin, sum m.a. lýsir hugtakið happing, vísir dømi um happing og hugskot til, hvussu happing kann basast og hvør hevur/skal hava ábyrgd, verður sendur skúlunum í næstum.

**Ráðstevna verður 13. nov. 2015 í Norðurlandahúsinum til tess at varpa ljós á trivnað og leggja ætlan fyri skipaðum átøkum í skúlunum**

***Næmingarnir hava frí hendan dag.***

**ES. Næmingar, sum eru í frítíðarskúlaskipanini, hava møguleika at vera í frítíðarskúlanum allan dagin, nærri kunning seinni.**

Mentamálaráðið skipar fyri ráðstevnu um kanningina, niðurstøðurnar og dagførda háttin at síggja/skilja fyribrigdið happing. Fyrilestrarhaldarar frá *eXbus-granskingarbólkinum* fara at lýsa nýggjastu granskingina og dømi um átøk, sum hava víst seg í verki at hava fyribyrgt og tálmað happing. Eisini verður tíð sett av til verkstovur, so ítøkilig ætlan kann fyriliggja, hvussu skúlar kunnu arbeiða víðari við trivnaðarátøkum.

Mentamálaráðið boðar frá, at øll starvsfólk skúlans fáa høvi at vera við á ráðstevnuni tann ***13. november 2015*** fyri skúlum í Tórshavnar Kommunu, Sandoynni og Suðuroynni.